# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Útbúgvingarnar hava skund

Formenninir fyri Føroya Pedagokfelag og Føroya Lærarafelag hava verið úti og víst á álvarsom viðurskifti í sambandi við støðuna í fólkaskúlanum og í dagstovnunum. Tað eru stórir trupulleikar á hesum økjum. Størsti trupulleikin er trotið á lærarum og námsfrøðingum. Fólkaskúlin og dagstovnaøkið eru grundvøllurin undir samfelagnum. Í dagstovnunum verða børnini sosialiserað og vand til at vera saman við øðrum.. Tey vinna sær teir sosialu førleikar, sum eru eins týdningarmiklir fyri børnini sjálvi og fyri samfelag og skúla. Hevur dagstovnaøkið tað ikki gott, so gongur hetta ikki bara út yvir børnini, men tað gongur í øðrum lagi út yvir alt samfelagið. Ein fortreyt fyri góðum og vælvirkandi dagstovnum er nóg mikið av vælútbúgvnum námsfrøðingum.

Fólkaskúlin hevur sína sera stóra uppgávu. Hann skal m.a veita næmingunum kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini. Hartil skal fólkaskúlin skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúp-hugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum. Skúlin skal geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling, menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna fyri bert at nevna nøkur av førleikakrøvunum.

Hetta er ein ómetaliga stór uppgáva, sum setur stór krøv til lærara, leiðslur, til land og kommunur. Vit kunnu staðfesta, at sama er galdandi fyri skúlan sum fyri dagstovnaøkið: Hevur fólkaskúlin tað ikki gott, so gongur hetta ikki bara út yvir børnini, men tað gongur í øðrum lagi út yvir alt samfelagið, og ein fortreyt fyri góðum og vælvirkandi skúla er, at nóg mikið er til av vælútbúgvnum lærarum. Tað hevur tískil alstóran skund at fáa nýggju lærara- og pedagokútbúgvingarnar á masterstøði at virka. Hinvegin hevur formaðurin í Lærarafelagnum rætt, tá hann sigur, at verða útbúgvingarnar ikki lidnar til komandi undirvísingarár, so er betur fyri allar partar at bíða heldur enn at at taka lesandi upp eftir gomlum og avoldaðum skipanum.
Nú má avvarandi landstýriskvinna taka sær um reiggj og útvega neyðugt tilfeingi, so arbeiðið við nýggju útbúgvingunum, sum byrjaði so væl undir fyrra landsstýrismanninum, kann verða gjørt til lítar og liðugt skjótast.

**Sosialurin**

## Øll tosa um veðrið…

ÓLAVUR PETERSEN

**- men eingin ger nakað við tað, segði Storm P á sinni**

Men nú hevur ein heilur veðurlagsídnaður tikið seg upp, sum skapar ræðslu og angist, - og sum fráliðir vil gera fjøld av fólki til hugkymlað vrak.

Okkurt av tí í Dimmu 1. apríl skal hava stuttar vimerkingar.

Tá tosað verður um spillvatn í sambandi við stóru megina av fríttfallandi vatni, sum verður skapað til elmegi, so er ta kanska ein sannleiki við stórum og ókendum modificatiónum.

Tað má vera munur á, at vatnið alt endar í sama umhvørvið sum áður (Vestmanna), og so tá vatnið verður leitt í Sundalagið, sum alt tað vit vitað um at siga er farið í Funningsfjørð.

Fara tankarnir yvir til stóra kontinentið í eystan, har stóru vatnmongdirnar vórðu leiddar frá at fara í Íshavið, men suðureftir til landbúna, og Aralsjógvurin varð brúktur til sama endamál, tá hevur vistfrøðin brúk fyri veldigum kreftum at fáa javnvág í aftur.

At tosa um nógv tað størsta elementið í heiminum sum spillvatn, má vera stytsta leiðin til undirgang.

Lítið verður tosað um fotosyntesuna í botanisku vísindini sum grundarlagið fyri øllum biologiskum lívi, sum umframt m.a. vatn og sól, brúkar kuldioxid, - hetta evni, sum veðurlagsguðurin Al Gore gevur alla skyldina fyri álvarsligu veðurlagsbroytingingunum.

Í staðin fyri at økja um fortretirnar fyri fotosyntesu, nú "vit í stórum hava økt um framleiðsluna av kuldioxid", so fella vit regnskógirnar.

Við kuldioxidinum út í luftina fara alskyns kemisk evnir sama veg og spjaðast runt um allan knøttin. Pólarnir verða av økta hitanum ikki bara minni í ummáls, men tað sum eftir er av teimum hevur av myrkara litinum mist ein part av førleikanum til at kasta heita sólarljósi útaftur í rúmdina.

Man skiftandi aktiviteturin á sólini hava so lítlan týdning fyri veðurlagið her á jørðini, sum menn vilja vera við.

Langa tíð áðrenn mannaættin fór í holt við at tosa um ymisk fyribrygdi í lufthválvinum kring jørðina, høvdu vit á okkara leiðum eitt tíðarskeið, sum søgumenn kalla fyri ístíðina, so nógv í hugarenslinum hjá okkum mannabørnum kann vera hugvekjandi at seta orð á.

Sum tá tað einaferð fyrst í fimmtiárunum letur í eini nógv lesandi konu norðuri í Tjørnuvík: Vitinskapurin kemur at forderva hesari verð.

Í Føroyum er júst maður heiðraður fyri at gera lívsins bók til einkis at vera.

Henda bók skrivar heimssøguna forlens, meðan mannabørn skriva søguna baklens.

Lívsins bók skrivar um tíðarskeið, har mannættin gerst ørkymlað og veit hvørki út ella inn.

Tonk! Í henni stendur eisini, at eldur skal koma í frumevnini, - hetta næstan 2000 ár áðrenn atomvísindin sá dagsins ljós.

Eg biði teg ikki um ikki at lurta eftir Al Gore, men eg biði teg eisini um at leggja oyra til Storm P, um ikki at fylla alt tína rúmd upp við øllum tí sum tú einki kanst gera við, men vera livandi upptikin av tí sindri sum hvør eistakur av okkum hevur við at gera í nærumhvørvinum og haganifrá so langt út sum lív og ávirkan okkara røkkur.

Sjálvsøkni og at vilja seg sjálvan er einasta orsøkin til ræðuleikarnar sum Al Gore umrøður, - og eingin ideologi ella læra av monnum hevur ella fer at rokka við okkara sjálvsøkni.

Men óttast ikki!

Rætt teg fram móti framtíðini við vón móti vón - og ævinleikanum við nýggjum himli og nýggjari jørð.

## Pilkar málfrøðin við beinagrind móðurmálsins?

EYÐUN Á BORG



**Ein skáli broytist til Skála;
ein múli broytist ikki til Múla!?**

Landsverk setti í samráð við Fróðskaparsetrið eina nevnd í fjør. Hendan nevndin skuldi endurskoða bygdanøvn. Mannanevndin, slíkt er ikki fyri kvinnur, giti eg, er komin til eina niðurstøðu. Í vissum førum er niðurstøðan kanska skilagóð, men í øðrum førum rættiliga margháttlig.

SKÁLI: Ein skáli (veikt bent kallkynsorð). Skáli merkir: rúm, smátta, hús, høll, gildisskáli.

Tit kunnu ikki broyta eitt vanligt, veikt bent kallkynsorð, ein skáli, og siga, at tað nú eitur ein skála!? (Competence og performance, eg hoyri tykkum).

LAMBI: Ein lambi (eisini veikt bent kallkynsorð). Tit mugu kunna siga meir enn Lambhagi um hetta orðið!? Hvør er týdningurin í fornmálinum av kallkynsorðinum, ein lambi? Hvat vita fólk, sum eita í Lambanum, at siga um hetta kallkynsorðið?

MÚLI: Ein múli (veikt bent kallkynsorð). Hví mæla tit ikki til at broyta hetta kallkynsorðið til Múla? Tað mátti borið líka væl til sum við skálanum!?

ÁHEITAN: Gott í tykkum, latið hesi meir enn 1000 ára gomlu kallkynsorð fáa frið at vera veikt bend kallkynsorð!

UPPSKOT: Á skeltið kunnu tit skriva: SKÁLI (hvørfall), og niðriundir kunnu tit skriva bygdarnavnið við fyrisetingum í klombrum: (á/av Skála). Á henda hátt læra fólk kanska at siga tað rætt. Snilt! Helst eindømi í heiminum.

SKÁLI (á/av Skála)
LAMBI (í/úr Lamba)

ÆRGIR: Møguliga áttu tit heldur at broytt Argir til Ærgir!? Tað er kanska málfrøðiliga rættari.

Eitt ærgi merkir: summarbit til neyt. Vit hava eisini staðanøvnini, Ærgisá og Ærgisdalur.

Eg veit ikki, hvat argjafólk halda um at broyta bygdarnavnið til ÆRGIR!?

**Við bygdanavnakvøðu
Á Borg á Argjum á
summartíðardegi 2008**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.